# Fríkirkjan "Oasan" verður vígd leygardagin

**Eftir at hava húsast á ymiskum støðum seinastu árini, kann fríkirkjan Oasan í Hoyvík nú síggja fram til komandi vikuskiftið, tá tey taka sín egna kirkjubygning alment í nýtslu**



*Nú byrjar arbeiðið av álvara í fríkirkjuni Oasuni í Hoyvík. Leygardagin verður kirkjan vígd*

KIRKJUVÍGSLA
*Snorri Brend*

**Hoyvík:** Fyri limirnar í samkomuni verður tískil leygardagurin 27. august ein heilt serstakur dagur, tí tey nú álvara kunnu leggja til brots við missiónsarbeiði sínum innanveggja og aðrastaðir við.

Í samband við hesa vígsluna fara fyristøðumaðurin, Jóni Johannesen og mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni at tala, eins og nógvur sangur er á skránni.

- Okkara hjartans ynski er, at øll skulu kenna seg sum ein part av kirkjuni og taka hetta húsið til sín sum sítt egna og brúka tað.

- Tí vilja vit gera okkara til at skapa eitt slíkt umhvørvi, har ein og hvør fer at kenna tað sum sítt egna heim, - ja, sum eitt andaligt friðskjól mitt í einum tryggum og góðum felagsskapi, sigur Jóni Johannesen.

Kirkjan sjálv er longu í brúki til gudstænastur, møtir og til barna- og ungdómsarbeiðið. Fyrsta møtið varð hildið her sunnudagin 5. juni, men ikki fyrrenn nú verður kirkjan altso vígd.

## Umfatandi skrá

Skráin fyri vígsluna av bygninginum sær spennandi út. Umframt luttøku úr Føroyum koma eisini kend fólk úr Noreg og Íslandi at taka lut.

Vígsluhátíðin byrjar hóskvøldið 25. august, tá ungdómsmøti verður. Fríggjakvøldið verður stór gospelkonsert fyriskipað, har ein vendur sær bæði til tey eldru og til tey yngru.

Við hesa konsertina fer Finnur Hansen at syngja, umframt bólkin Proclaim og gospelkórið United Voices.

Sjálv vígslan verður leygardagin kl. 15, tá ein vígslugudstænasta verður á skránni, har fyristøðumaðurin og mentamálaráðharrin fara at tala.

Við hetta høvið fara eisini Torbjørn, Annika, Sigrið og onnur at syngja, eins og dansibólkurin Saltið hevur eina framførslu. Aftaná verður ábit, eins og fólk fáa høvið at hyggja seg um í kirkjuni.

Um kvøldið verður møtið við tí eina útlendska gestinum. Tá fer nevniliga kendi Føroya-vinurin, Eivind Frøen úr Noregi at tala og ein manstrio úr Soli Deo Gloria í Klaksvík at syngja.

Sunnudagin 28. august verður so fyrst gudstænasta kl. 11, har Fridrik Schramm úr Íslendsku Kristskirkjuni talar og Ester, Jannet og onnur syngja.

Seinnapartin kl. 14 er sunnudagsskúli á skránni, har m.a. Absalon Árgarð og familja hansara luttaka.

Um kvøldið - kl. 18 - verður so aftur evangeliskt møti við Eivind Frøen, har Torbjørn, Annika, Sigrið og onnur syngja. Aftaná hetta møtið verður nátturði.

# EB-dagar fyri børn og vaksin

**Um vikuskiftið verða aftur teir sonevndu EB-dagarnir hildnir á Eiði. Á skránni eru tiltøk av alskyns slagi og fyri allar aldursbólkar**



*Eiðsfólk verða um vikuskiftið vertir fyri teim serstøku EB-døgunum*

BYGDASTEVNA

**Eiði:** Hetta tiltakið, sum ikki bert snýr seg um ítrótt og kapping, byrjar fríggjakvøldið kl. 19:30. Tá verður ítróttargudstænasta har sóknarpresturin Emil Olsen fer at prædika.

Síðani verður hildið á um kvøldið við brotssparkskapping fyri børn og vaksin, og við rennikapping niðan á Koll. Annars er ymiskt til undirhalds restina av hesum fyrsta kvøldinum, eins og bæði barna- og ungdómsdiskotek verða í EB-húsinum.

Leygarmorgunin verður lagt árla til brots: Longu kl. 8 verður byrjað við fótbólti á vøllinum niðri á Mølini. Beint eftir døgurða verður fyrst ein bjargingarroynd á vatninum, har ein tyrla frá Atlantic Helicopters fer at luttaka. Síðani verður stórt show við TrøllaPæturi og ommuni, har børnini eisini fáa høvið at heilsa uppá hesar báðar stjørnurnar.

Kl. 15 verður ein sera spennandi 1. deildardystur leiktur millum tvey av ovaru liðunum í deildini – heimaliðið EB/Streym og HB. Aftaná verða fleiri hondbóltsdystir leiktir í ítróttarhøllini, m.a. ein millum 1. mansliðini hjá VÍF og Kyndli. Seinni verður so hildið áfram við fótbólti, hondbólti, tivoli og øðrum fyri børn og vaksin.

Kl. 21:30 verður fólkafundur, har Annika Egholm fer at røða. Har verður felagssangur, eins og dansifelagið á Látrinum fer at kvøða. Eftir hetta er dansur í EB-húsinum við tveimum kendum monnum úr Klaksvík – Jákup Marner Anthoniussen og Heina Ziska Dahl.

Skráin sunnudagin byrjar kl. 14 við fleiri fótbóltsdystum í teim eldru deildunum, m.a. skulu 1. deildarliðini hjá kvinnum hjá EB/Streymi og AB spæla. Kl. 18 verður útimøti á Vaglinum.

Hóast EB-dagarnir eru eitt tiltak um vikuskiftið so verður kortini hildið á mánakvøldið kl. 19:30, tá stevnubingo verður í EB-húsinum á Eiði.

Í sambandi við tiltakið verða eisini tvær serstakar kappingar – ein kapping í Gásaskvetti og ein kapping í Proppagiti.

So er bert eftir at vóna, at veðrið verður til vildar, so nógv fólk fáa høvið at fara til Eiðis um vikuskiftið.

**sb.**

# Koyrikortið kann rúka á staðnum



*Tær herdu ferðslureglurnar raka eisini tey tungu akførini. Førarin av ein lastbili kann missa kortið beinanvegin, um hann koyrir skjótari enn 90 km/t í bygdum øki*

*(Tilvildarlig mynd)*

**Nú kann ein bilførari missa koyrikortið á staðnum, um ferðin er munandi meiri enn loyvt er. Arbeitt verður framvegis við at gera reglur um herda frádøming, tá ungir bilførarar bróta ferðslulógina**

FERÐSLULÓG
*Snorri Brend*

**Bilar:** 1. september koma nýggjastu broytingarnar í ferðslulógini í gildi, og hava hesar munandi herd krøv til bilførarar.

Eftir nýggju broytingunum, kann ein bilførari, sum koyrir skjótari enn 100 km/t í bygdum øki, har vanliga ferðmarkið er 50 km/t, missa koyrikortið beinanvegin.

Somuleiðis kann koyrikortið takast beinanvegin, um koyrt verður skjótari enn 130 km/t í óbygdum øki, har vanliga ferðmarkið er 80 km/t.

Um ferðmarkið er lækkað, t.d. á ávísum vegastrekkjum ella í samband við vegarbeiði, kann koyrikortið verða tikið beinanvegin, sjálvt við eini lægri ferð.

## Tung akfør

Fyri tung akfør, so sum lastbilar og bussar, eru reglurnar eisini vorðnar strangari.

Førari av tungum akfari kann missa koyrikortið beinanvegin, tá koyrt verður skjótari enn 90 km/t í bygdum øki, har ferðmarkið er 50 km/t, og somuleiðis um koyrt verður skjótari enn 110 km/t í óbygdum øki, har ferðmarkið fyri hesi akfør er 70 km/t.

Tá frádømingartíðin er liðin kann førarin bert fáa koyrikortið aftur, um hann stendur eina nýggja koyriroynd í teori og koyring.

Endamálið við herdu reglunum er ein roynd at steðga tí skilaleysu koyringini, har koyrt verður so skjótt, at stórur vandi er fyri lív og heilsu hjá førara, ferðafólki og øðrum ferðandi.

## Arbeiðið steðgar ikki

Lítil ivi man vera um, at tey í Ferðslutrygd eru fegin um at hesar broytingarnar nú koma í gildi.

Og landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, er eisini fegin um hetta.

- Eg eri sera væl nøgdur við, at Løgtingið tók undir við uppskotinum um at herða reglurnar fyri grov brot á ferðmørkini.

- Arbeiðið steðgar tó ikki her, tí eg havi givið umsitingini boð um at fyrireika aðrar broytingar í ferðslulógini. Hesar snúgva sera serliga um herdar frádømingarreglur, tá ungir bilførarar bróta ferðslulógina, sigur Bjarni Djurholm í eini viðmerking til broytingarnar.

# Nýggj koyriroynd og treytaða frádøming

Bæði fyri løtt og tung akfør er tað framvegis galdandi, at koyrikortið verður frádømt treytað, um ferðin er meira enn 30 km/t ávíkavist 20 km/t upp um vanliga hægstamarkið fyri ferð.

Hetta merkir, at bilførarin hevur ein treytaðan dóm hangandi yvir høvdinum í 3 ár, og harafturat skal upp til eina nýggja koyriroynd, bæði í teori og koyring. Stendur hann ikki ta royndina, missir hann koyrirættin og skal taka koyrikortið av nýggjum.

Koyrir ein bilførari t.d. 81 km/t í bygdum øki, har ferðmarkið er 50 km/t, verður koyrikortið frádømt treytað, og hann skal upp til nýggja koyriroynd.